## DAGSINS MEINING

# Leiðin til friðar

Valið í Ísrael gjørdist heilt øðrvísi, enn flestu eygleiðarar høvdu spátt. Tey flestu mettu, at nýggi miðflokkurin Kadima fór at vinna stórsigur, men soleiðis gjørdist úrslitið sum kunnugt ikki. Kadima gjørdist størsti flokkur og fer ivaleyst at skipa stjórn men noyðist at gera samgongu við aðrar flokkar. Arbeiðaraflokkurin stóð seg væl og gjørdist næststørsti flokkur. Nú standa sera torførar samgongusamráðingar fyri framman. Hesar samráðingar fara at vera avgerandi fyri gongdina í Miðeystri.

Kadima er sum kunnugt stovnaður sum ein miðflokkur, og orsøkin til stovnanina var tann, at Sharon ikki fekk Likud at taka undir við tí politikki, ið hann ætlaði at reka mótvegis palestinum. Eftirmaður Sharons, Olmert, hevur vunnið valið við einum politikki, ið víkur nakað frá politikkinum hjá Sharon, ið neyvan kemur fyri seg aftur. Politikkur Olmerts er, at Ísrael sjálvt setur síni mørk uttanum altjóða samfelagið og uttan samráðingar við palestinsku sjálvstýrisstjórnina. Partur av hesum mørkum skal tryggjast við tí verjugarði ella múri, sum Sharon byrjaði at byggja. Hin vegin er Olmert sinnaður at lata palestinsku sjálvstýrisstjórinini meginpartin av Vestara áarbakka aftur. Hesin politikkur er nógv øðrvísi enn tann politikkur, ið Sharon rak. Hartil kemur, at Olmert einki vil hava við Hamas stjórnina í Ramalla at gera.

Hesin polikkur Olmerts er sera vandamikil fyri friðin í Miðeystri, tí hann útilokar palestinsku stjórnina so væl sum altjóða samferlagið. Men Olmert sleppur ikki einsamallur at gera av, hvør politikkur, ið skal rekast. Peres, sum er farin úr Arbeiðaraflokkinum og upp í Kadima, heldur rimmarfast við tann sonevnda roadmap politikkin. Hetta merkir, at Peres heldur fast við Olso friðartilgongdina. Peres hevur beint eftir valið greitt frá, hvat hetta merkir. Hetta merkir, at palestinar skulu hava teirra egna stat. Aftur fyri at palestinar fáa sín egna stat, skulu teir semjast við Ísrael um landamørkini, steðga yvirganginum og viðurkenna rætt Ísrales at vera til. Arbeiðaraflokkurin, sum verður við í komandi stjórnini, hevur júst somu støðu sum Peres. Tað er vanlig semja um, at Olmert fær ikki myndað stjórn uttan Peres og eisini Arbeiðaraflokkin, og tí eru nú góðar vónir um frið í hesum parti av Miðeystri. Men leiðin eftir vegakortinum, Road map for peace, til friðar verður ein sera long og tung tilgongd, ið krevur, at øll stórveldi og stóru arabisku londini medvirka.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Judas býr ikki í Eysturoynni!

JOHAN PETERSEN



**– Í samband við miseydnaða formansvalið hjá Johan Dahl er nógv komið fram, sum ikki er í tráð við veruleikan. Eitt nú ein analysa hjá útvarpinum, har Samhald verður lagt undir ikki at atkvøða, sum lovað, skrivar Johan Petersen**

Í tíðindasendingini í útvarpinum týskvøldið 28.03. ger útvarpsmaðurin Dia Midjord eina analysu av, hvussu atkvøðurnar til formansvalið hjá Sambandsflokkinum seinasta vikuskifti fullu.

Í hesi analysuni kemur útvarpsmaðurin fram til, at sambandsfelagið í Eysturoynni, Samhald var tvíbýtt, men tá ið avtornaði, var ongin atkvøða til Johan Dahl.

**Ikki spurd**

Hvussu tað skal lata seg gera, at gera eina analysu av einum vali, sum fer fram skrivliga, má vera sera truplult. Og tá serstakliga, tá ið tú ikki eingang spyrt teir ella tey, sum hava luttikið í valinum!

Útvarpsmaðurin hevur rætt í, at Samhald var tvíbýtt í síni støðu til hvørt av valevnunum atkvøðast skuldi fyri. Nevndin í Samhald telur ikki færri enn 13 limir, men felagið hevur sum øll hini lokalfeløgini bert 5 atkvøður á landsfundi Sambandsfloksins. Tessvegna hava vit, tá ið veljast skal á landsfundi, eina undanatkvøðugreiðslu, har 13 atkvøður verða kókaðar niður í fimm eftir vanligum reglum.

**So einfalt var tað**

Hetta gjørdu vit eisini hesaferð og var útfallið 3 og 2. Teir fimm nevndarlimirnir, sum fingu til uppgávu at atkvøða, atkvøddu samsvarandi hesi avtalu – annað formansvalevnið fekk 3 atkvøður og hitt 2. Atkvøðuseðlarnir blivu heilt einfalt lagdir fram á borðið og góðtiknir av øllum fimm. So einfalt var tað!!

Útvarpsmaðurin er kunnaður um hetta, men hevur í skrivandi løtu ikki rættað ósonnu analysuna og mistonkiliggeringina av Samhaldi.

**Valið skuldi vera í sátt og semju**

Viðskurður Johan Dahls eftir formansvalið kom óvart á, serliga tí, at viðhaldsmenn hansara høvdu gjørt vart við, at bæði formansvalevnini høvdu avtalað, at valið skuldi fara fram í sátt og semju. Men kanska var tað líka gott, at útfallið av valinum bleiv so sum tað bleiv við slíkum atburði.

**Størst av øllum er at vinna á sær sjálvum**

Størst av øllum er at vinna á sær sjálvum. Tað gjørdi Jóannes Eidesgaard bæði tá ið hann tapti formansvalið móti Maritu Petersen og tá ið hann eftir óhepnu hendingina fyri opnum skermi legði kortini á borðið. Tað var stórt. Og tí kann hann í dag sita sum løgmaður!

Eisini Edmund Joensen vísti format, tá ið hann sum sitandi formaður tapti móti Lisbeth Petersen. Hann smekkaði ikki við hurðunum, og tí kann hann í dag sita sum einmælt valdur løgtingsformaður!

Um Johan Dahl hevur sama format, fer so tíðin at vísa. Enn er ikki ov seint.

# Ein viðmerking til formannin í Neistanum, Jón Kragesten

JOHILD ZISKASON
Klaksvíkingur, bútsitandi í Havn

Var mær leitandi niðan á Nabb í kvøld 29. mars 2006 til hondbóltskamp millum Neistan og Stjørnuna 1. deild kvinnur. Ikki sørt spennandi, tí síðsti dysturin millum liðini bæði kundi havt givið Neistanum meistaraheitið, um spælt var javnt ella um tær vunnu sjálvandi síðsta vikuskiftið, men sum kunnugt vann Stjørnan stórt.

Undirritaða er Stjørnu fjeppari, tað skal ikki verða nøkur loyna, men hinvegin ikki ein, ið møtir upp til dyst, men meira ein, ið fylgir væl við gjøgnum útvarp og sjónvarp, men dysturin í kvøld hevur verið so mikið uppreklameraður av báðum liðunum, at avgjørt var, at fara sær niðan at hyggja.

Neistin hevði lýst í útvarpinum fyrr um dagin um, at fáa Neista fjepparar at møta fjølmentir og stundisliga,. Hetta ljóðaði sera hugaligt, so sjálvandi skundaði undirritaða sær eisini niðan í góðari tíð, fyri at fáa sitipláss. Uttan at vita nakað um spælireglur millum ávikavist Stjørnu og Neista fjeppara, setti undirritaða seg á ein bonk saman við dóttrini og 2 vinkonum, ið búgva í Havn, men eru úr Klaksvík – hesin bonkur skuldi vísa seg at verða í Neista reiðrinum. Orsøkin til, at ein setti seg har, var tí onnur síðan í høllini var stúgvandi full av Stjørnu fjepparum, og vit valdu so at seta okkum so tætt upp á teir sum møguligt, men í Neista reiðrinum. Knappuliga reisir ein persónir seg upp, ið situr framman fyri, vendir sær við og biðjur okkum vinarliga um at flyta, tí hetta er plássið hjá Neista fjepparum! Hesin persónur er formaðurin í Neistanum Jón Kragesten. Fyri at siga sum er, so helt eg at hann skemtaði, men tað vísti seg, at maðurin meinti tað í rama álvara.

Góði Jón Kragesten – sera ódámligt. Ikki nøkur vøkur vælkoma. Høllin er til fyri bæði teg og meg. Um tú regluliga kemur niðan á Nabb, so meti eg ikki tú hevur betur rætt til eitt sitipláss haruppi enn eg. Eg havi goldið líka so nógv fyri at komi inn sum tú. Mín 7 ára gamla dóttir, ið er fødd og uppvaksin í Havn, hevði glett seg nógv til at koma til dyst. Hon vildi so fegin sita har vit sótu, tí hon helt við Neistanum. Hvussu heldur tú hon hevur upplivað eina slíka vælkomu? Harafturat so kundi Neista fjeppararnir kanska møtt eitt sindur meira stundisliga, so høllin var stúgvandi full av Neista fjepparum, áðrenn onnur dittaðu sær niðan?

Annars skal sigast, at vinkonurnar báðar valdu heldur at fara aðra staðir at seta seg, men eg og dóttirin sótu báðar eftir. Tað gekk væl – fólkið rundan um, vísti seg ikki at hava nakran trupulleika av at hava okkum báðar sitandi. Dóttirn rópti og klappaði, tá tað gekk við hjá Neistanum, meðan mamman rópti og klappaði, tá tað gekk við hjá Stjørnuni, so alt í alt ein góð uppliving.

Í seinna hálvleiki valdu vit at fara at vitja í hinum reiðrinum, eisini fyri at merkja hýrin (Stjørnu megin), og má sigast, at væl spældi av hjá okkum Klaksvíkingum.

Til-lukku Stjørnan við Føroya Meistara heitinum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.